## Skjótur túrur

Finnur Fríði, sum roynir eftir makreli, gjørdi ein skjótan túr hesaferð. Teir mynstraðu sunnudagin í Bergen, har teir eisini høvdu tikið olju. Útafturkomnir fingu teir eitt hampiligt kast beinanvegin. Tað vísti seg at vera 210 tons, og støddin var góð - 510 gram í meðal. Teir fóru inn at landa beinanvegin, og tað eydnaðist teimum at fáa umleið 10,20 krónur fyri kilo. Har hevur prísurin ligið nú móti endanum á makreltíðini.

## Keypa farteldur

Í Danmark er eftirspurningurin eftir farteldum framvegis stórur, og serfrøðingar á marknaðinum undrast á, at eftirspurningurin kann standa við og veksa so leingi. Í juli-ársfjórðingi vórðu seldar 32 prosent fleiri farteldur enn í sama ársfjórðingi í fjør. Í Danmark eru tað serliga farteldur frá HP, sum eru væl umtóktar, men Acer og Fujitsu Siemens ganga eisini væl. Tilsamans fóru 290.000 teldur um donsku diskarnar í juli-ársfjórðingi.

Stjórin á Jarðfeingi:

# Sannførdur um at vit finna olju

**– Vit vita, at tað er olja og gass i undirgrundini, spurningurin er at finna goymslur, sum eru nóg stórar so man kann vinna tær út. Eg eri rímuliga sannførdur um, at tað fer at eydnast, og at vit gerast eitt nýtt oljuland, innan rímuliga framtíð sigur stjórin á Jarðfeingi við ÚF sendingina ”62 norður”**

OLJUFRAMTÍÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Útvarp Føroya viðgjørdi í sendingini ”62 norður” seinasta fríggjadag spurningin um framtíðar oljuvirksemið við Føroyar. Sendingin tók samanum oljutilgongdina í Føroyum og vísti á, at í fimm ár hava verið fimm brunnar boraðir men at vit enn bíða vit eftir teimum góðu tíðindunum, at olja er her.

Útvarpið spurdi stjóran í Jarðfeingi, Sigurð í Jákupsstovu, hvussu tað er at vera stjóri í eini oljufyrisiting í einum landi, sum framvegis ikki kann kalla seg oljuland. –Tað er ein avbjóðinbg og sera spennandi. Vit hava nokkso aktiva leiting í Føroyum, og tað er eitt spennandi starv. Vit hava ikki funnið olju í rasktararverdum nøgdum enn men vit hava ávíst olju.

Hann segði víðari við útvarpið, at útlitini at finna olju og gass við Føroyar eru framvegis góð. Olja er ávist og vit liggja tætt við tað bretska økið við Hetland, har oljuframleiðsla hevur verið og vindur uppá seg. Vit vita eisini, at jarðfrøðin føroysku megin markið er rættiliga álík henni bretsku megin. Vit trúgva uppá, at vit finna olju við Føroyar vóru hóast alt bjartskygdu metingarnar hjá stjóranum á Jarðfeingi.



*Sigurð í Jákupsstovu her umborð á Stena Don. Hóast eingin olja varð funnin er stjórin á Jarðfeingi bjartskygdur*

*Mynd Jan Müller*

Sendingin tosaði eisini við norska oljujournalistin Arnt Even Bøe, sum starvast á Stavanger Aftenblad. Hann vitjaði í Føroyum nøkur ár herfyri og helt skeið og fyrilestur fyri føroyskum journalistum um norsku oljutilgongdina og um oljumál sum heild. Hann sigur við ÚF, at tað er ov tíðliga at siga, at oljuævintýrið í Føroyum ongantíð verður av nøkrum. Hann minnir á, at tað tók fleiri ár og fleiri royndarboringar á norskum øki, áðrenn lønandi oljufund vórðu gjørd. Í Barentshavinum t.d. gingu heili 20 ár frá tí, at olja var funnin til farið var undir at útvinna hana.

- Hyggja vit eftir tí, sum hendi í Noregi, so eru Føroyar framvegis inni í eini leitifasu, og eg trúgvi ikki, at nakað av feløgunum eftir fimm turrar brunnar ætlar at gevast við leitingini. Vit mugu minnast til, at í hvørjum turrum brunni finna jarðfrøðingarnir í oljufeløgunum nýggja vitan, sum teir brúka fyri at minka um váðan í ti næsta brunninum. Sjálvandi fara tey feløgini, sum hava borað mest, at sita inni við mest vitan, og tí fara tey eisini at halda fram.

Við útvarpið sigur Sigurð í Jákupsstovu annars, at tað tekur drúgva tíð at byggja upp eitt nýtt oljuøki, og Føroyar eru enn eitt heilt nýtt øki í oljuleitihøpi, hóast vit hava verið í gongd í seks ár. Vit hava bert fimm boringar og tað er eitt stórt øki at fara um. Tey feløgini, sum hava tær mestu informatiónirnar eru tey, sum hava verið her longst, og tað eru tey, sum fara at halda á eisini. Tey flestu oljufeløgini arbeiða langsiktað. Og tann fyrsti brunnurin á basaltøkinum gevur týðandi vitan til framtíðar leiting við Føroyar.

Sigurð í Jákupsstovu sigur víðari við útvarpið, at tað ber til at halda gongd í leitingini og tað smidligasta er, at tey, sum eru her, halda fram. Hann væntar eisini, at feløgini, sum hava verið við í Brugduboringini og sum vera við í boring næsta ár, fara at brúka vitanina frá Brugduni tá.

### Slaka

Sambart útvarpinum metir norski journalisturin, at føroyskir myndugleikar møguliga verða noyddir at slaka um krøvini yvirfyri oljufeløgunum, nú einki er funnið enn, og man vil hava tey at vera verandi her, og nevnir ”62 Norður” sendingin í hesum sambandi eitt nú krøvini til føroyskan keikant.

- Uttan at eg kenni til, hvat oljufeløgini hugsa, so er tað nátturligt, at tey fara at tosa við myndugleikarnar um krøvini, sum sett eru fyri, at tey skulu fáa lønsemi í sínar framtíðar leitiboringar. Linka so føroyskir myndugleikar um krøvini, so er sjálvandi vandin, at føroyingar fáa minni burtur úr. Alternativt kann man eisini siga, at feløgini taka seg aftur og eingin olja verður funnin.

Tá útvarpið spyr Sigurð í Jákupsstovu, um teir noyðast at slaka við krøvunum um, at alt t.d skal um føroyskan keikant, sigur hann, at tað enn er ov tíðliga at siga nakað um tað. –Undan hvørjum loyvisumfari meta vit um krøvini og leggja tey fyri landsstýrið, sum skal góðkenna hesi. Tað er rætt, at summi feløg siga, at tað er eitt óneyðuga dýrkandi element, at man skal flyta vøruna til Føroyar fyrst fyri so at flyta tað útaftur, men tað hevur verið sæð sum ein máti at fáa tað føroyska samfelagið við í oljuleitingina. Tað er so ein politisk avgerð, hvat man ger við tann spurningin.

Uppá fyrispurning um tað er lætt at selja undirgrundina til oljufeløgini, nú einki er funnið sigur Sigurd í Jákupsstovu við útvarpið, at eitt fund er gjørt og vísir til Marjunfundið. Tað er so eisini staðfest olja aðrastaðni, og av tí at tað nú ber til at bora gjøgnum basalt og tøknin at síggja gjøgnum basalt er betrað metir stjórin á Jarðfeingi, at leitingin hevur flutt seg nógv í Føroyum til tað betra, og tí skuldi tað borið til at selt økið væl og virðiliga.

### Bjartskygdur

Uppá fyrispurning um prísurin, sum spyrst burtur úr komandi leitingini kann vera, at oljufeløgini vilja hava meira í sin part av møguligum olljumilliardum svarar stjórin á Jarðfeingi , at tað kann tað kanska uppá sikt, men tað er aftur ein metingarspurningur, júst sum við kaikantinum. Hann leggur aftrat, at tað føroyska økið hevur verið mett at vera rímuliga attraktivt og á sama støði sum onnur lond tó at lond sum Írland og Grønland hava bíligari skipan enn vit.

Tað er ein bjartskygdur stjóri á Jarðfeingi, sum endar áhugaverdu samrøðuna við útvarpið við hesum orðum: -Vit vita, at tað er olja og gass i undirgrundini, spurningurin er at finna goymslur, sum eru nóg stórar so man kann vinna tær út. Eg eri rímuliga sannførdur um, at tað fer at eydnast, og at vit gerast eitt nýtt oljuland, innan rímuliga framtíð.

Lesið eisini Vinnusíðurnar á síðu 22 og 23

# Varðveitið krøv til keikantin




**- Vit halda okkum kunna veita eina góða tænastu til oljufeløgini, ið bora, og tær útreiðslurnar, sum feløgini hava her hjá okkum, eru evarska lítlar samanborið við, hvat ein brunnur kostar. Og so eru eisini nógvir fyrimunir við at kunna brúka okkara vørur og tænastur sigur havnameistarin í Runavík, sum ávarar ímóti at taka krøvini til keikantin av. Vinnusíðurnar hava tosað við hann.**

OLJUVINNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Sunnudagin setti boripallurin Stena Don kós heimaftur til Noregs. Eftir at hava arbeitt á Brugduleiðini síðani miðjan juli mánað varð nú loksins riggað av á hesum sinni. Pallurin kom á Nólsoyarfjørð at gera arbeiðið endaliga liðugt, áðrenn lagt varð til havs. Veðrið varð heldur ikki av tí besta á Brugduleiðini í farnu viku, og tí varð mett rætt heldur at rigga endaliga av her undir landi. Í kjalarvørrinum av tí laka úrslitinum – kolvetni vórðu ikki funnin – hevur orðaskifti tikið seg upp um framtíðar oljuleitingina við Føroyar og í hesum sambandi eisini um tær skipanir, sum hava verið galdandi hesi seks árini síðani fyrstu loyvini vórðu latin.

Ein av hesum skipanum er kravið um føroyska keikant tvs. at útlendsku oljufeløgini, sum bora á landgrunninum, skulu brúka føroyska havn og flogvøll og føroyskar vørur og tænastur í tann mun hesar eru kappingarførar.

Nú um dagarnar valdi útvarpið í nýggju sendirøð síni 62 norður at seta fokus á oljuvinnuna, har spurningurin varð reistur, um ikki oljufeløg kunnu fara at seta krøv fram um at sleppa undan at brúka eitt nú føroyska keinkant, nú leitingin enn ikki hevur








*Runavíkar havn, Atlantic Supply Base og Skipafelagið bjóða seg fram aftur at taka ímóti oljufeløgunum, sum bora á landgrunninum. BP samtak fer at brúka útgerðarhavnina í 2007. Myndir: AWJ, Atlantic Supply Base og Runavíkar havn*

givið nakað lønandi fund.

Hetta hevur havnameistarin og fyrrverandi borgarstjórin í Runavík, Jákup Lamhauge eina greiða meining um. Sum ein av teimum, ið dagliga hevur verið við í arbeiðinum at veita vørur og tænastur til oljupallar og skip, sum bora eftir olju á landgrunninum, veit hann, hvat tað vil siga, at krav er í oljulógini um, at útlendsku oljufeløgini skulu brúka føroyska havn til partar av borivirkseminum.

## Góð tænasta

Jákup Lamhauge sigur, at nógv av tí virksemi, sum teir standa fyri í sambandi við eina slíka boring sum hesa seinastu, er nakað, sum skal gerast, líka mikið um tað er her ella aðrstaðni. Og talan er ikki um stórar upphæddir, tá hugsað verður um, at tað hevur kostað hálva milliard at bora seinasta brunnin. Í tíðarskeiðinum frá juli til oktober hevur tað kostað borisamtakinum góða hálva millión at brúka fasilitetir og tænastur hjá Runavíkar havn. Her er talan um fastsetingar, brúgva- og havnagjald, leigu av havnaøki, vatn, vørugoymslu osfr. –Tá hetta verður drigið fram í kjakinum sum eitt dýrkandi element, so er hetta so lítil partur av samlaða kostnaðinum, at tað átti ikki at sáað iva um tað rímuliga í krøvunum til keikantin sigur Jákup Lamhauge, sum eisini vísir á, at tað hevur bara tikið 6 tímar at sigla úr Runavík til boripallin. Varð útgerðarhavnin í Aberdeen ístaðin, so hevði hetta tikið einar 18 tímar. Og tá hevði verið neyðugt við fleiri skipum. Haraftat kemur at í Runavík fær tú avgreitt alt um eina leið. Umframt virksemi hjá Runavíkar havn kemur so eisini tað virksemi, sum Atlantic Supply Base stendur fyri, her er talan um allar tangarnar og so tað avgreiðsluvirksemi, sum Skipafelagið hevur um hendi í sambandi við logistikkin. Sjálvur heldur Jákup Lamhauge, at tað mátti verið lagamanni hjá einum oljusamtaki, sum borar á landgruninum, at brúkt vørur og tænastur, sum kunnu latast frá útgerðarhavnini í Runavík. Hann hevur eisini varhugan av, at feløgini eru sera væl nøgd við teirra tæntastur. At talan er um leiting ger so eisini, at talan er ikki um tað heilt stóra virksemi á landi. Tað er longu avtalað, at BP-samtak, sum fer at bora næsta ár, skal brúka Runavík sum útgerðarhavn. Havnameistarin í Runvík, sum ikki er ein og hvør. Sum fyrrverandi borgarstjóri í hesum grógvandi vinnumiðdeplinum veit hann eisini, hvat tað vil siga, at vit føroyingar eru við í oljutilgondini og sleppa at menna okkum sohvørt henda nýggja vinnan fær fastatøkur her um okkara leiðir.



# Oljan, ið hvarv

**- Eg eri stak ónøgdur við siteringina. Hon er tikin úr samanhanginum, og samrøðan var fleiri vikur gomul, sigur Jákup Lamhauge, analytikari hjá Eik Bank, um greinina í Berlingske Business, sum endurgav hann fyri at siga, at leysatíðindi vóru um, at nógv olja var funnin við Føroyar**



*- Eg var ikki sørt bilsin, tá eg las greinina í Berlingske Business. Fyri tað fyrsta var samrøðan gjørd fleiri vikur, áðrenn greinin kom í blaðið. Tað vil siga áðrenn, at Sosialurin bar tíðindini um, at eingin olja var funnin, sigur Jákup Lamhauge, analytikari hjá Eik Bank*

OLJA
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Fleiri vóru bilsin, tá úrslitið frá boringini á Brugduleiðini varð kunngjørt týsdagin. Tí tríggjar dagar áðrenn hevði danska blaðið Berlingske Tidende á sínum vinnusíðum borið tíðindini um, at olja var funnin í stórum nøgdum.

Í greinini "Oliefeber i Nordatlanten" verður Jákup Lamhauge, analytikari hjá Eik Bank, siteraður fyri at siga, at hann hevur hoyrt leysatíðindi um, at borurin hjá Stena Don hevur rakt við eitt risastórt oljufelt. Positivu tíðindini ávirkaðu millum annað kursin hjá føroyska oljufelagnum Atlantic Petroleum, ið gjørdist toppskorari á danska virðisbrævamarknaðinum stutt eftir, at greinin stóð í danska blaðnum.

## Bilsin og ónøgdur

Men greinin hjá danska blaðnum var gass, og Jákup Lamhauge stóð eftir við svarta Per. Tí eftir stóð spurningurin, hvussu ein analytikari hjá Eik Bank, ið dagliga fæst við at keypa og selja virðisbrøv, kundi fara so skeivur í síni meting.

- Eg var ikki sørt bilsin, tá eg las greinina í Berlingske Business. Fyri tað fyrsta var samrøðan gjørd fleiri vikur, áðrenn greinin kom í blaðið. Tað vil siga áðrenn, at Sosialurin bar tíðindini um, at eingin olja var funnin, sigur Jákup Lamhauge.

Sambært Jákupi Lamhauge visti hann ikki, at samrøðan skuldi nýtast til eina grein.

- Blaðmaðurin segði ongantíð, hvør hann var. Eg helt, at hann var eitt viðskiftafólk, ið spurdi seg fyri. Eg segði bara, sum var, at nógv leysatíðindi vóru, millum annað í norsku fjølmiðlunum, sum staðfestu, at olja var funnin, greiðir Jákup Lamhauge frá.

- Eg eri stak ónøgdur við siteringina. Hon er jú tikin úr samanhanginum, sigur analytikarin hjá Eik Bank, ið vísir á, at leysatíðindini um oljuna í Føroyum var ein lítil eykasetningur í eini longri samrøðu um millum annað privat danskar pensiónsgrunnar, ið vóru áhugaðir í at seta pening í Atlantic Petroleum.

## Onnur tíðindi ávirkaðu

Jákup Lamhauge ivast annars í, hvussu stóra ávirkan, endurgevingin um leysatíðindini hevur havt á kursin hjá Atlantic Petroleum. Hann vísir á eina aðra grein, sum stóð í sama blaði, um at fleiri pensjónsgrunnar hava sett pening í Atlantic Petroleum, millum annað pensjónsgrunnurin PKA, ið umsitur pensjónsinngjaldið hjá donskum sjúkrarøktarfrøðingum og sosialráðgevarum. PKA setti 27,5 milliónir krónur í føroyska oljufelagið.

- At ein pensjónsgrunnur setir so nógvar pengar í eitt oljufelag skapar álit millum aðrar investorar, og hevur sostatt ávirkað kursin. Hesi tíðindini vórðu eisini nógv endurgivin í øðrum donskum fjølmiðlum. Tað var bert í Føroyum, at leysatíðindini um stóra oljufundið, vórðu endurgivin, vísir Jákup Lamhauge á.




# Partabrøv hækka enn

MARKNAÐARRÁK

Partabrøv hildu áfram at hækka í farnu viku. Dow Jones vísitalið er hækkað upp um stigið í 2000, og S&P500 vísitalið yvir 500 tey størstu partabrøvini í USA er hækkað væl upp um tað, tað var áðrenn lækkingina í mai mánað. Sama myndin er galdandi flest alla staðni. Í Evropa eru tað bert Noreg og Finnland, sum ikki eru komin upp um stigið í mai. Sum heild er alheims partabrævamarknaðurin hækkaður 14% síðan hann var lægst í juni, og 12% higartil í 2006. Hendan gongdin er stuðlað av góðum inntøkum hjá virkjunum, eins og hon hevur verið síðan 2003. Sostatt er kursgongdin í tráð við inntøkurnar hjá virkjunum. Tó er 14% upp á 4 mánaðir ein skjót hækking, og lækkingin í mai, sum var tann størsta í 3 ár, kann hava lopið hvøkk á íleggjarar. Tí er ikki óhugsandi, at vit fáa eina lítla rætting niðureftir í partabrøvunum innan alt ov leingi.

## Lánsbrævarentur hækkaðar

Lánsbrævarenturnar hækkaðu aftur í farnu viku. Danska 10-ára rentan er nú 3,95%. Hetta er tað sama sum 1-árs rentan, og bendir á, at lánsbrævaíleggjarar hóast alt ikki óttast prísvøkstur í løtuni.

## Góðir roknskapir

Nú er tíð til roknskapirnar fyri 3. ársfjórðing. Amerikonsk virkir vóru sum vanligt fyrst úti, og har hava 173 av teimum 500 virkjunum í S&P500-vísitalinum kunngjørt roknskap. Úrslitið higartil stuðlar undir hækkandi partabrævakursum. Inntøkurnar eru øktar 18% hetta seinasta árið, og hetta er 3% meir enn íleggjarar væntaðu. Á okkara leiðum eru roknskapirnir eisini byrjaðir at koma. Serliga er sjóneykan sett á smærru donsku peningastovnarnar, sum hava havt sera góð úrslit seinastu árini. Hesa vikuna kunnger m.a. Ringkjøbing Landbobank roknskap.

## Hesa vikuna

Hetta verður væntandi aftur ein áhugaverd vika á virðisbrævamarknaðunum. Aftrat roknskapum verða eyguni havd við amerikanska tjóðbankanum, sum hevur fund týskvøldið. Um tey geva ábendingar um, at rentuhækkingarnar ikki eru av, kann hetta tálma partabrøvum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 593,91 | -0,2% | ↓ |
| JPY | 4,98 | -0,4% | ↓ |
| GBP | 1.112,86 | 0,5% | ↑ |
| NOK | 88,59 | 0,8% | ↑ |
| SEK | 81,04 | 0,8% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,26 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 118,67 | 1,1% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 606,00 | -9,3% | ↓ |
| KB Trygg Eurostoxx | 106,63 | 0,1% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

Vika 43